Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Løgtingið,
Att: Vinnunevndin
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, 8. mai 2024
Journal nr.: 23/23485

Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 117/2023 Uppskot til løgtingslóg um tøkugjald

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum er komin eftir, at rættingar eiga at verða gjørdar í ávísum ásetingum í uppskotinum til løgtingslóg um tøkugjald. Landsstýrismaðurin heitir við hesum á Vinnunevndina um at rætta uppskotið samsvarandi niðanfyristandandi.

Í uppskoti til løgtingslóg um tøkugjald, løgtingsmál nr. 117/2023, verður skotið upp at gera hesar rættingar:

1. § 1, stk. 2, verður orðað soleiðis:
   "Sum alivinna eftir stk. 1 verður roknað virksemi á smoltstøðum, aling av fiski á sjónum og kryvjing á landi."
2. § 2, stk. 1, verður orðað soleiðis:
   "Feløg, fevnd av § 1, skulu í sambandi við tøku av alilaksi rinda tøkugjald til landskassan."
3. § 2, stk. 2, verður orðað soleiðis:
   "Avgjaldsgrundarlagið er grundað á mánaðarligu tøkuna av alilaksi í kruvdari vekt, faldað við miðal altjóða marknaðarprísinum í sama mánaði."
4. § 3, stk. 3, verður orðað soleiðis:
   "Upplýsingar um mánaðarligu tøkuna av alilaksi skulu innan 15. í mánaðinum aftan á tøkuna latast TAKS. Um upplýsingarnar ikki verða latnar TAKS innan ásettu freistina, verður sekt upp á kr. 1.000 løgd afturat tøkugjaldinum fyri avvarðandi mánað."

Viðmerkingar
Til § 1, stk. 1 og stk. 2
Ásetingin lýsir, hvat er at meta sum alivinna sambært uppskotinum. Sum alivinna verður roknað alt virksemi í sambandi við aling, frá og við virksemi á smoltstøðum og fram til fiskurin verður kruvdur. Virksemi aftaná hetta, t.d. víðari tilvirking av kruvda fiskinum, er ikki at meta sum alivinna sambært uppskotinum.

Í sambandi við at nýggj lóg verður gjørd, verður, fyri greidleika skyld, skotið upp at broyta § 1. Sambært § 1, 1. pkt. í galdandi lóg er ásett: "Skyldu til at rinda tøkugjald sbrt. hesari løgtingslóg hava allar fyritøkur og allir einstaklingar, sum reka vinnuliga alivinnu í Føroyum. ..."

Í alilógini § 6 d er ásett, at aliloyvi kann verða latið: "... partafeløgum og smápartafeløgum, sum eru skrásett hjá Skráseting Føroya, ella eru fráboðað Skráseting Føroya sum undir stovnan. Kapitalpartar skulu gevast út við navni."

Harvið kunnu aliloyvi ikki latast einstaklingum, og tí verður skotið upp at taka orðið "einstaklingar" úr §§ 1 og 2 í løgtingslógini.

Av tí at allar fyritøkurnar, sum í dag hava aliloyvi, eru skipaðar sum partafeløg, so hevur broytingin ikki avleiðingar fyri vinnuna.

Til § 2, stk. 1
Broytingin í § 2, stk. 1, er ein avleiðing av broytingini í § 1.

Fyri at ivi ikki skal standast um lógarøkið, er orðingin "alifiski" broytt til "alilaksi" fyri greidleika skyld.

Til § 2, stk. 2
Orðaljóðið í ásetingini er hitt sama sum í galdandi lóg, og við lógaruppskotinum verður ikki lagt upp til nakra broyting í mun til galdandi áseting. Endamálið er, at grundarlagið fyri avgjaldinum verður lýst. Grundarlagið er vektin á tikna kruvda alilaksinum, umroknað til miðal altjóða marknaðarprís í sama mánað.

Eins og í § 2, stk. 1 er orðingin "alifiski" broytt til "alilaksi" fyri greidleika skyld.

Til § 3, stk. 3
Orðaljóðið í ásetingini er hitt sama sum í galdandi lóg, og við lógaruppskotinum verður ikki lagt upp til nakra broyting í mun til galdandi áseting. Hetta er sama áseting sum § 2, stk. 6, í upprunaligu løgtingslógini. Tó at orðingin "alifiski" er broytt til "alilaksi" sum avleiðing av broytingini í § 2, stk. 1 og stk. 2.

Ásett verður, at alarar mánaðarliga skulu upplýsa TAKS um, hvussu nógv teir taka av alilaksi. Vektin, sum skal upplýsast TAKS, er tann kruvda vektin. Hendan verður síðani, saman við altjóða marknaðarprísinum, brúkt til at rokna marknaðarvirðið og tøkugjaldið.

Vinarliga

Høgni Hoydal
landsstýrismaður